

Íløgustjóri til Sp/f 14

# Eitt gott eyga fyri íløgum

Sært tú nýggjar møguleikar? Tevjar tú, hvat kastar av sær? Og vilt tú royna kreftir á altjóða marknaðum? So er eitt spennandi starv sum íløgustjóri leyst at søkja.

Sp/f 14 seldi skipasmiðjuvirksemið úr felagnum í fjør, og síðan eru ymsar broytingar gjørdar innanhýsis. Nú eru vit til reiðar at fara til verka sum íløgufelag.

Sum íløgustjóri verður tú við til at menna eina gamla fyritøku við nýggjum avbjóðingum. Talan er um eitt spennandi starv við góðum møguleikum fyri fakligari menning. Felagið hevur heimstað í Føroyum, men vit virka í einum magnandi altjóða umhvørvi. Ætlanin er, at vit verða 3 til 5 fólk, sum røkja virði felagsins á skynsamasta hátt.

**Starvið**
Starvið sum íløgustjóri fevnir um at fylgja við íløgum felagsins innan- og uttanlands. Tú skalt hava eitt gløgt eyga fyri nýggjum íløgumøguleikum, og tín uppgáva verður at greina og leggja íløgumøguleikar fyri nevndina. Vit samstarva við fleiri uttanhýsis íløguráðgevar, bæði í Føroyum og uttanlands, og tú samskiftir javnan við teir.

**Førleikar**
Vit rokna við, at tú hevur hægri útbúgving og royndir. Góður kunnleiki til íløguvirksemi er ein treyt, og vit leggja dent á tíni evni at síggja, hvar møguleikarnir liggja. Tú hevur dirvið, torir at taka avgerðir og samskiftir raðið á enskum.

**Treytir og umsókn**
Vit bjóða tær ein virkispall á altjóða stigi og áseta setanartreytirnar í felag. Hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi, ert tú vælkomin at ringja til Gunnar Mohr, stjóra, á 501121 ella við telduposti: gmo@14.fo

Umsóknarfreistin er 8. november 2005.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til:

Sp/f 14
Stílað Gunnari Mohr
J.C. Svabosgøta 29
FO-100 Tórshavn

Sp/f 14 varð stovnað í 1936 og rak skipasmiðjuvirksemi til 2004. Fyritøkan virkar nú burturav sum íløgufelag. Eginognin tann 31.12.2004 var 288 milliónir krónur. Vit virka í einum altjóða umhvørvi og hava samband við íløgufeløg og peningastovnar kring alt Evropa.

**Sp/f 14**
J.C. Svabosgøta 29, FO-100 Tórshavn, www.14.fo






Hvønn mikudag og leygardag fram til 23. nov. verður kappingin í blaðnum. Fleiri seðlar, geva størri møguleiki at vinna. Drigið verður í Miðlahúsinum 26. november kl. 14, har Trøllapætur, Nósi og Kular Røtur eisini luttaka.

VINN EINA KULA FERÐ
VIÐ ATLANTIC AIRWAYS
+ Kular Røtur savnsfløgur og sangbøkur

Vinningar:
Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við Atlantic Airways
10 Kular Røtur savnsfløgur
10 Kular Røtur sangbøkur
10 Jólini hjá Trøllapætur

NÓSI · ATLANTIC AIRWAYS · MBM · Postverk Føroya

Grønir menn frá Pluto

1. Nær gongur Pætur í svøvni?

2. Frá hvørji Planet eru rúmdarmenninir?

3. Hvør hevur rúmdarkoyrikort?

Navn:

Bústaður:

Send til: **Kular Røtur • Sosialurin • postboks 76 • 110 Tórshavn,** innan 25. nov.

www.kularrotur.com